# Klinikkassistentur

**Søkt verður eftir einum útbúnum klinikkassistenti fulla tíð at byrja 1. desember 2010**

Vit eru nú 18 starvsfólk og okkum tørvar ein útbúnan klinikkassistent fulla tíð afturat.

Vit hava víðkað virksemið okkara við tveimum nýggjum tannlæknum, Mortan í Hamrabyrgi og Hallu Úlvsdóttir við Høgadalsá og einum nýggjum kliniskum tannteknikkara Gunnar Wardum.

Nú ber aftur til hjá nýggjum patientum at fáa tíð til viðgerðir í privat regi.

Vit gera alla tannrøkt og tannviðgerð, kirurgi, tannhaldsendurskapan, implantat, endurskapan av tyggifunktión, kosmetisk tannviðgerð og protesuviðgerð.

Í løtuni eru vit 5 tannlæknar, 1 kliniskur tannteknikkari, 2 tannrøktarar og 9 klinikkassistentar og hjálparfólk.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**Tannlæknamiðstøðin á Óðinshædd 1, 100 Tórshavn**
**Ella: Unnur@tonn.fo**

Innan 15. nov. 2010

TANNLÆKNAMIÐSTØÐIN
ÓÐINSHÆDD 1 | FO-100 TÓRSHAVN | TEL 315300

**Eirikur Hofgaard • Jakku Heinesen • Unnur Jensen**

## Hósdagin 4. november kl. 17.15

Í sendingini Vinnu- & Bilradio verður vitjað á fyritøkuni Kelvin á Hjalla, sum hevur spesialiserað seg í loysnum innan køling og hitaendurvinning. Fyritøkan arbeiðir eisini við aircondition anleggum í øllum støddum, eisini til bilar. Í hesum sambandi er samrøður við Kristian Martin Skála og Petur Egholm frá Kelvin. Eisini er samrøða við Michael Juul Hansen frá FTZ.

Í vinnuinnslagnum er samrøða við Charlotte Ellendersen, sum eigur og rekur fyritøkurnar Daddan og Smyrjibreyðsbúðina í Havn.










Vinnu- & bilradio á Rás 2

# ÚTSKIFTING Í DEPLI

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 um útskifting, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund hósdagin 18. nov. 2010 kl. 10.00 í gamla skúla, Sundsvegur 31, Hvannasund.




Til viðgerðar verður uttangarðsútskifting av hagapartinum

**Millum Húsanna**
**matr. nr. 157a, Depils bygd.**

Nevndarlimir eru:
Olaf í Garði Joensen, Eiði.
Heini á Heygum, Vestmanna

# ÚTSKIFTING Í SØRVÁGI

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 um útskifting, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 17. nov. 2010 kl. 10.00 í hølunum hjá húsmøðrafelagnum, Ovarivegur 8, Sørvágur.




Til viðgerðar verður uttangarðsútskifting av hagapartinum

**Úttriðingur Selvíkar, vestari partur**
**matr. nr. 424b, Sørvágs bygd.**

Nevndarlimir eru Marita í Brekkunum, Hósvík
Olaf í Garði Joensen, Eiði.
Petur Nielsen. útsk.form.